Les meir um okkum á mission10forty.org
Stuðla okkara arbeiðið á reg. 5958 konta 1103963

**VINALIGA FYLL ÚT OG GEVIÐ SEÐILIN TIL EIN ÚR MISSION10FORTY:**

**Navn:.........................................................................**

**Bústaður:..................................................................**

**Telefon:....................................................................**

**Teldupostur:............................................................**

**SET KROSS:**
**• Ynskir**

- **Iimaskap.........**
- **Ynski at vera barnastuðul.........**
- **Ynski at stuðla við einum mánaðarligum upphædd á kr.........**

**Mission10forty**
**Fuglsangvej 11, DK-4720 Præstø, Denmark**
**Tlf: +45 30700249 | CVR 42647489 |**

**Bank: Faster Oikos Andelskasse: Reg. 5958. Konto 0001103963**

**Mail: Info@mission10forty.org |**
**www.mission10forty.org |**
**www.facebook.com/mission10forty/**

# SKRÁ

## STÓRT OG JÓLALIGT STUÐULSTILTAK

## KLAKSVÍK

**Fríggjadagur 14. november, 19.30 – 22.00**
**Varpið, Klaksvíksvegur 2, Klaksvík**

**Við Sjúrði Skaale, Artak Beglaryan, Kim Hartzner, Irinu Hayrapetyan og Suð**

**Tíðarskrá:**

**19.30 -** Vælkomin við Tummas Pauli Mýri
**19.35 -** Sjúrði Skaale og Artak Beglaryan
**19.55 -** Samrøða millum Sjúrður Skaale, Artak Beglaryan og Kim Hartzner
**20.00 –** Framløga: “Føroyski stuðulin til Armenia” við Kim Hartzner og Peter Vincent Hartzner
**20.15 –** Suð
**20.25 -** Samrøða við Irinu Hayrapetyan við Kim Hartzner
**20.30 -** Klaverframførsla við Irinu Hayrapetyan:
• Johann Sebastian Bach: Cantata BWV 147: Jesu, Joy of Man's Desiring, g-dur. (3.00 min)
• Sergej Rakhmaninov: Prelude, cis-mol. (4.30 min)
• Arno Babajanian: Elegy, g-mol. (4.00min)
**20.50 -** Liðugt við fyrra partin, við Kim Hartzner
**20.55 –** Steðgur
**21.10 -** Klaverframførsla við Irinu Hayrapetyan:
• Frédéric Chopin: Nocturne, cis-mol. (3.30 min)
• Komitas: “Garuna” – Vár, c-mol. (4.33 min)
• Aram Khachaturian: Toccata, ges-dur. (4.00 min)
**21.30 -** Liðugt við Kim Hartzner og Artak Beglaryan
**21.35 -** Kaffi og køkur



**Sjúrður Skaale:**
Øll kenna Sjúrð, sum í 2024 fekk heiðurin Årets Danske Tale fyri rørandi talu í Fólkatinginum 29. mai. Føddur 1967, giftur við sálarfrøðinginum Súsannu O. Skaale, og eiga tey tveir synir. Kendur sum skemtari og politikkari, og síðan 2011 umboðar hann Javnaðarflokkin á Fólkatingi. Hann hevur skrivað bøkur um politikk, átrúnað og Føroyar. Á tiltakinum sigur hann frá ferðini til Armenia við Mission10forty og møtunum við flóttar úr Nagorno Karabakh.

**Artak Beglaryan:**
Fyrrverandi forsætisráðharri í Nagorno Karabakh, blindi Artak Beglaryan, flýddi í september 2023 saman við 120.000 aftaná álop úr Aserbajdsjan. Nú er hann flóttafólk í Armenia og hevur fingið hjálp frá Mission10forty. Hann deilir sína søgu og takkar fyri føroyskan stuðul. Við hesum stuðli hevur Mission10forty hjálpt fleiri túsund kristnum armenum – meira enn 10.000 hava fingið beinleiðis hjálp.
Flóttarnir hava framvegis stóran tørv. Mission10forty styrkir sjálvbjargni við seyði, hønsum og øðrum landbúnaði, og veitir sálarliga hjálp til hundraðtals børn við áfalli. Veturin í Armenia er harður, við kulda niður í –30 til –40 stig. Hjálp kristnu armenunum at fáa vón og hita – tendrið eitt ljós í myrkrinum. Vit standa saman við Artak og teimum mest útsettu familjunum.

**Takk, føroyska fólkið.**



**Kvinnukórið Suð úr Klaksvík:**
Er mannað við 22 kvinnum. Tær hava sungið síðani aug. 2002 og hava bygt sær eitt breitt repertoire upp. M.a. syngja tær klassiskt, sálmar, sangir, spirituals, gospel og jazz og tær elska at syngja og at gleða fólk við sangi.



**Lækni Kim Hartzner**
"Í 1992 byrjaði eg eitt hjálpararbeiðið í Armenia og havi til í dag hjálpt fleiri enn 100.000 armenum at fáa eitt betri lív. Men í september mánað 2023, bleyv eg skelkaður fyri lívið: Eg sá hvussu vesturheimurin sveik Armenia og tigandi hugdi at meðan 120.000 kristnir armenar blivu rikin frá húsum og heimum sínum í Nagorno Karabakh, har tey hava búð síðstu 1700 árini.
Eg vil nú gera alt hvat eg kann fyri at forða fyri søgan endurtekur seg – og armenarar ikki aftur blíva offur fyri víðfevndum fólkamorðið sum í 1915."
Lækni Kim Hartzner sýnir fram film um stuðulin úr Føroyum til armensku flóttarnar úr Karabakh.



**Irina Hayrapetyan:**
Eitt undurbarn úr Armeniu. Longu sum 14 ára gomul vann hon eina Chopin-kapping fyri ungar tónleikarar.
Irina er fødd og uppvaksin í Armenia og útbúgvin sum konsertpianistur og kamartónleikari á hægri tónlistarskúlum í Yerevan og Tel-Aviv og kongaliga danska hægra tónlistarskúlanum í Keypmannahavn.
Í dag arbeiðir Irina á tí kongaliga danska leikhúsinum í Keypmannahavn. Irina Hayrapetyan førir fram verk av armenskum tónaskøldum, Bach, Chopin og Rachmaninov.